# Sosialurin

Nr 199 týsdagur • 16. oktober 2001 • 75. árgangur • Kr. 12,00

www.sosialurin.fo








Eftirmetingin frá liðnum:

## Lítli maðurin við stóra motorinum

Ítróttur, síða 11–23

## Skipari í bronsu

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



Leygardagin varð ein bringumynd úr bronsu avdúkað á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Og hesuferð var hetta ikki mynd av deyðum manni, men einum spilllivandi eldri skipara, sum hevur sett sína sjónligu slóð í føroyskt vinnulív.

Turrliga, knappa og mynduga andlitið á John Dam skipara í Havn er stoypt í bronsu av kenda listamanninum Hans Paula Olsen og komandi útmælingar innan fiskivinnuna verða í framtíðini mintir á, at tað er dirvi og gløggskygni, sum skal bera okkara fiskivinnu víðari fram at ókendum øldum.

Og djarvur hevur hann verið, John Dam. Hóast vinnan, hann legði lunnar undir, rækjuvinnan, gevur seg sáran í hesum døgum, so reisir hon seg aftur. Og hon er grundarlagið undir dagliga breyðnum hjá tíggjutúsundtals fólki í Norðuratlantshavi.

John Dam var sjálvur hjástaddur, tá myndin varð avdúkað og tað er Tórbjørn Jacobsen, fyrrverandi landsstýrismaður í mentamálum, sum tók stig til bringumyndina beint áðrenn hann legði frá sær. Sum eigari og skipari á farmaskipi hevur hann ført mong túsundtals tons av rækjum úr Grønlandi og inn á europæiska meginlandið.



Reiðari um nýggja farmaskipasáttmálan:

# Fer at kroysta skip úr flotanum

**Yvirmenninir á føroysku farmaskipunum fingu 20 prosent í lønarhækkan og tað er formaðurin í Skipara og Navigatørfelagnum væl nøgdur við. Men formaðurin fyri Reiðarafelagnum fyri Farmaskip er dapur. -Vandi er fyri at føroysk skip fara at flagga út, verður óliviligt í Føroyum. Vit eru í harðari kapping og tað er ikki rúmd fyri ov stórum hækkingum í okkara útreiðslum, sigur hann**

S. 6–7







